Føroya Arbeiðsgevarafelag skal hervið gera vart við eina rættleiðing til álitið í løgtingsmál nr. 30/2025: **Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku**.

Í sætta petti í álitinum stendur skrivað soleiðis:"*Løgtingslóg um starvsmenn ásetir, at persónar, sum t.d. arbeiða í handli, hava rætt til løn frá arbeiðsgevara í upp til 120 dagar í sjúkrafráveru. Tað merkir, at viðkomandi ikki hevur rætt til dagpening.*"

Tað er ikki rætt, at starvsmenn einans hava rætt til løn frá arbeiðsgevara í upp til 120 dagar orsaka fráveru vegna sjúku. Starvsmenn fáa løn undir sjúku frá 1. degi at rokna og so langi starvsetanin heldur fram.

Við setan av starvsmanni kann skrivliga avtalast millum arbeiðsgevara og starvsmann, at starvsmaður kann sigast upp við 1 mánaða uppsagnarfreist, um starvsmaður innan fyri eitt tíðarskeið av 12 fylgjandi mánaðum hevur tikið ímóti løn undir sjúku í 120 dagar tilsamans.

Hetta merkir, at 120 daga reglan snýr seg um treytirnar viðvíkjandi uppsagnartíð, og ikki um hvussu leingi ein starvsmaður hevur rætt til løn undir sjúku. Ein starvsmaður kann sigast upp vegna sjúku við vanligari uppsagnarfreist ella sambært 120 daga regluni. Fyri at brúka 120 daga regluna skal hetta vera ásett í skrivligum sáttmála – vanliga setanarskrivinum. 120 daga reglan merkir, at starvsmaður kann sigast upp við ein mánað freist, tá ið starvsmaður teir seinastu 12 mánaðirnar hevur tikið ímóti løn undir sjúku í 120 dagar tilsamans.

Longri setanartíð gevur longri uppsagnarfreist, og arbeiðsgevari kann sambært uppsagnarfreistini í grein 2, stk. 2 í starvsmannalógini hava skyldu at rinda starvsmanninum løn í upp til 6 mánaðar í uppsagnartíðini, um ikki 120 daga reglan er avtalað ella verður brúkt.

Vinarliga/Best Regards

Bára Gunnarsdóttir

Ráðgevi

Phone: +298 309900 · Mobile: +298 739903

bara@industry.fo - www.industry.fo

